## Ískoytisútbúgving eitt hitt

Heilar 102 umsóknir eru komnar inn til ískoytisútbúgvingina hjá sjúkrarøktarfrøðingum, skrivar sjukrarokt.fo. Útbúgvingin, sum uppgraderar sjúkrarøktarfrøðingar eftir gomlum útbúgvingnum til bachelor í sjúkrarøktarfrøði, byrjar eftir ætlan í september mánaða. Bert fjórði hvør umsøkjari fær játtandi svar, tí skúlin boðar frá, at 28 lesandi koma at ganga í hesum fyrsta flokki. Felagið metir, at tað fer at taka nøkur ár at uppgradera allir teir sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava hug at taka bachelorstøði. - Tað er sera týdningarmikið, at øll fáa hetta høvið, og at útbúgvingin heldur fram, til ongin eftirspurningur er meira. Ískoytisútbúgvingin er ikki bert eitt hitt, men eitt neyðugt stig fyri menning av sjúkrarøktarfrøðini, skrivar felagið á heimasíðuni.



# Kollveltandi broytingar í Postverkinum

**Føroyingar skulu í framtíðini avgreiða postin á bensinstøðum og handlum kring landið. Stjórin í Postverkinum kunngjørdi seinnapartin í dag eina trý ára ætlan fyri Postverkið, sum ber í sær stórar broytingar fyri Postverk Føroya**



*Postverk Føroya er í gongd við at snara virkseminum hjá felagnum 180 stig. Eftir øllum at døma verða flestu posthúsini niðurløgd. Ístaðin skulu postørindi kunna avgreiðast á bensinstøðum kring landið*

*Savnsmynd*

POSTVERK FØROYA

*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Klokkan trý seinnapartin almannakunngjørdi stjórin í Postverkinum Sofus Clementsen ætlaðu broytingarnar. Ætlanin verður verður nevnd "180 stig ætlanin", og heitið boðar frá kollveltandi broytingum í Postverkinum.

Sosialurin hevur tosað við keldur innan Postverkið, sum hava greitt frá broytingaruppskotinum hjá leiðsluni. Sambært okkara keldum inniber ætlanin, at nøkur posthús kring landið verða niðurløgd yvir eitt longri áramál, og at ávís postviðurskifti framyvir kunnu avgreiðast á Shellstøðum kring landið.

Postverkið hevur sambært okkara keldum gjørt eina avtalu við Shell um, at ein partur av postavgreiðsluni framyvir verður á bensinstøðunum hjá Shell. Í økjum har eingin Shellstøð er, fer Postverkið at gera avtalur við handlar. Postverkið hevur eisini í hyggju at innføra nýggjar elektroniskar skipanir, sum skulu gera avgreiðsluna lættari og skjótari.

Stjórin í Postverkinum, Sofus Clementsen, vildi fyrrapartin hvørki vátta ella avsanna tær upplýsingar, sum Sosialurin hevur fingið uppspurt.

Hatta eru reinar gitingar. Kom á tíðindafund seinnapartin, og so fáa tit nágreiniliga at vita, hvat ætlanin gongur út uppá, sigur Sofus Clementsen.

Hann váttar tó, at leiðslan arbeiðir við einari trý ára ætlan, sum verður nevnd "180 stig ætlanin", og at hon inniber stórar broytingar í Postverkinum.

Hann sigur, at hann vónar, at kundin fer at brúka Postverkið meira í framtíðini, og at postavgreiðslan í framtíðini verður har, sum kundin helst vil hava hana at liggja.

Klokkan 13 í dag vórðu øll starvsfólk í Postverkinum boðin til kunnandi fund á Óðinshædd, har stjórin í Postverkinum, Sofus Clementsen, greiddi starvsfólkunum frá komandi broytingunum. Øll starvsfólk í Føroyum skuldu møta á hesum fundinum.

Fyri stuttum boðaði Postverkið frá stórum broytingum í postútberinginum, sum framyvir verður avgreidd seinnapartar av fólki, ið ikki arbeiða fulla tíð, og í komandi tíðum skulu fólk eftir øllum at døma venja seg við grundleggjandi broytingar innan bæði postútbering og vanliga postavgreiðslu, sum vit kenna hana í dag.

Meira verður at frætta um málið í Sosialinum í morgin.

# Vinnudagurin verður 26. september

**Í ár verður vinnudagurin fríggjadagin 26. september. Evnið hesaferð verður nýskapan, menning og nýhugsan**

VINNUDAGUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Vinnudagurin er aftur hesaferð samansettur av spennandi fyrilestrum í Norðurlandahúsinum og einum døgurða á Hotel Føroyum.

Hesaferð hevur Vinnuhúsið valt at varpa ljós á evni nýskapan, menning og nýhugsan. Allir fyrilestrarnir snúgva seg sostatt á ein ella annan máta um hesi evni.

Íslendingurin Lárus Ásgeirsson er stovnari og sølustjóri á Marel Food Systems, sum er ein vælkend fyritøka í Føroyum. Hann fer at siga nøkur orð um, hvussu hugskotið til Marel var til, og frá gongdini frá byrjanini hjá fyritøkuni til nú at vera ein alheims fyritøka.

Liselotte Lyngsø er futurist og altjóða serfrøðingur innan nýskapan og framtíðargransking. Hon fer at hyggja eftir, hvussu tey góðu hugskotini verða ment við støði í framtíðar møguleikum. Liselotte Lyngsø hevur m.a. verið granskingarleiðari á Instituttet for Fremtidsforskning og er í dag partnari í Future Navigator, sum ráðgevur um framtíðargrundaða hugskotsmenning.

Heini Zachariassen fer at greiða frá væleydnaðu søguni um BullGuard frá byrjan til nú, hann tekur seg úr fyritøkuni. Heini er vælkendur í Føroyum, og varð fyrr í ár valdur til nevndarformann á Føroya Tele.

Hermann Oskarsson er umframt at vera kendur sum stjóri á Hagstovuni eisini kendur fyri sín hvassa penn, og á Vinnudegnum 2008 fer hann at seta upp eina ironiska spegilsmynd av okkum sjálvum.

Umframt hesar fýra fyrilestrarnar verða eisini Ársins Virki og Ársins Átak kosin.